# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein

## ADAMS VIÐ GITTAR




Bryan Adams hevur verið ígjøgnum tað mesta. Hann hevur spælt erligan rocktónleik, er farin á flog við yvirdimensioneraðum tónleiki og hevur skrivað eymar – onkuntíð næstan plattar – balladur. Men eftir Adams liggur ein røð av framúr góðum sangum, og hendan fløgan bjóðar einfaldar live-framførslur av kendu sangunum hjá Adams. Fløgan byggir á konsertferð í vár, tá Adams fyri tað mesta spældi gittar og sang einsamallur fyri fólki.

**BRYAN ADAMS**
Bare Bones



## NÝGGJUR X FACTOR FEPUR

So er DR farið undir eina nýggja røð av X Factor sangkappingini. Hetta hevur verið nakað av tí best umtókta danska sjónvarpið seinastu árini, og føroyingar hava eisini fylgt væl við – serliga tí føroyskir sangarar hava verið við. Onnur sendingin í nýggju røðini verður fríggjakvøldið.

**X FACTOR**
DR1
Fríggjakvøldið 7/1 kl. 19.00



## HEIÐURSLØNT FØROYSKT DOOM METAL

Rockbólkurin Hamferð hevur givið sína fyrstu útgávu út, og á Planet Awards vann bólkuri heiðursløn sum besta nýggja navn. Hamferð er á konsertferð hesa vikuna. Í gjárkvøldið spældu tey í Gøtu, í kvøld verða tey at hoyra í Havn og í annaðkvøld á Tvøroyri.

**HAMFERÐ**
Sjónleikarhúsið í Havn 7/1
Seglloftið á Tvøroyri 8/1

## ANNA FAROE Í LØKSHØLL



Føroyska songkvinnan Anna Faroe, sum hevur verið virkin í Danmark, hevur í kvøld konsert í Løkshøll í Runavík. Anna Faroe brakaði ígjøgnum í donsku X Factor kappingini fyri einum ári síðani. Hon gjørdist ein av profilunum í kappingini, og síðani hevur hon eisini givið fløgu út í Danmark og hevur havt nógvar framførslur har. Nú kann hon upplivast á palli í Føroyum saman við føroyskum bólki.
Anna Faroe

**KONSERT Í LØKSHØLL**
Fríggjakvøldið 7/1 kl. 20.00



## NÝGGJÁRSKONSERT

Árliga Nýggjárskonsertin hjá Føroya Symfoniorkestri verður leygarkvøldið. Konsertin verður hildin í Norðurlandahúsinum í Havn, og hon verður eisini send til Føroya fólk umvegis Kringvarpið. Á konsertini spælir Symfoniorkestrið ymisk kend klassisk verk, og solistar taka eisini lut.

**NÝGGJÁRSKONSERTIN 2011**
Norðurlandahúsið
Leygarkvøldið 8/1 kl. 19.00

## STEYPA-FÓTBÓLTUR Í ONGLANDI




Enska FA Cup er helst kendasta steypakappingin í heiminum, og tað eru nógvar traditiónir knýttar at kappingini. Nú koma stóru feløgini upp í ársins steypakapping, har tað plagar at henda nógv óvæntað. Í fjør tók Leeds øll á bóli, og teir hava eina stóra uppgávu at loysa, tá ið teir vitja Arsenal leygardagin.

**ARSENAL-LEEDS**
FA Cup
Leygardagin 8/1 kl. 12.45